ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3Postboks 208
110 Tórshavn

20. november 2021
Mál: 21/23238-2
Tygara Skriv:
Viðgjørt: BÁT

Nr. 52-076/2021

Svar uppá § 52a fyrispurning nr. 52-076/2021 frá Bjørt Samuelsen, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í almannamálum Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, um eftirlit við og tryggjan av, at borgarar á ellis- og røktarheimum fáa nøktandi røkt, endurmenning og viðlíkahaldsvenjing

Fyrispurningurin ljóðar soleiðis:

1. Hvør hevur eftirlit við, at heilsutænastur og røkt av eldri, ið búgva á ellis- og røktarheimum ella sambýlum, eru nøktandi?

2. Hevur nakað eftirlit verið hesum viðvíkjandi síðani kommunurnar tóku ábyrgdina av eldraøkinum? Um ja, í hvønn mun? Um nei, hví?

3. Hvør ásetir og tryggjar, at eldri búfólk á stovni fáa tær tænasturnar, ið ásettar eru í § 1 í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.?

4. Verður gjørd nøkur góðskumeting og samanbering av tilboðunum í teimum ymisku kommununum og heimunum/bústovnunum?

5. Smb. § 10 og § 11 í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m., hava kommunurnar skyldu at veita heimabúgvandi pensjonistum endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing. Hvønn rætt hava pensjonistar, ið búgva á heimum, til endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing?

6. Í hvønn mun verður endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing givin pensjonistum, ið búgva á ellis- og røktarheimum, og er munur á kommunum, í hvønn mun, hesi tilboð verða givin?

7. Hvør hevur eftirlit við, hvørt pensjonistar, ið búgva á heimum, fáa neyðug tilboð um endurmenning og endurvenjing?

8. Er eldralógin endurskoðað, sum ásett í § 22 í lógini, og um ja, er ætlanin at gera nakrar tillagingar í lógini, sum kvalitetstryggja tilboðið um røkt og menning fyri búfólk á ellis- og røktarheimum og á sambýlum?

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

Svar:

Til nr. 1

Sambært § 19 í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. eru tað kommunurnar, sum hava eftirlit við bústøðum, tænastum og tilboðum, sum verða veitt við heimild í lógini. Tað eru eisini kommunurnar, sum kunnu steðga virksemi og tænastum sambært lógini, um krøvini í lógini ikki verða hildin.

Til nr. 2

Sambært Kommunufelagnum hevur einki eftirlit verið síðani økið varð lagt til kommunurnar at umsita.

Til nr. 3 og 4

Tað eru kommunurnar, sum sambært § 3 í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m., skulu tryggja at eldri búfólk á stovni fáa tær tænasturnar, ið ásettar eru í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Lógin er ein sokallað rammulóg, sum setir upp nakrar karmar fyri, hvussu kommunurnar skulu og kunnu veita tænastur og tilboð. Kommunurnar gera sjálvar av, um tær ynskja at veita fleiri tilboð og tænastur enn ásett í lógini, og hetta kann sjálvandi gera, at tilboðini og tænasturnar eru ymiskar frá kommunu til kommunu. Tað er ikki lagt upp til, at tilboðini og tænasturnar skulu samanberast.

Til nr. 5
Sambært viðmerkingunum til § 14, stk. 1, í lógaruppskotinum frá 2014, gera kommunurnar sjálvar av, hvussu tænastan á heimunum verður løgd til rættis og hvørji tilboð teir borgarar, sum búgva á røktarheimi ella eldrasambýli, skulu hava í boði. Her verður umframt røkt og hjáveru, hugsað um virkistilboð, førleikamenning o.t.

Til nr. 6
Tað er munur á, hvussu endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing er skipað á eldraøkinum kring landið.

Yvirhøvur fáa búfólk á bústovnum endurvenjing eftir tørvi. Til dømis eftir at tey eru liðugt viðgjørd og útskrivað av sjúkrahúsi.

Eisini verður skipað fyri bólkavenjingum á nógvum bústovnum við tí endamáli at styrkja virkisførleika og at fyribyrgja og útseta, at virkisførleikin versnar.

Sambært kommununum er terapuetiska virksemið á eldraøkinum styrkt síðan økið varð yvirtikið.

Til nr. 7

Sí svarið til nr. 1

Til nr. 8

Sum nevnt í svarinum til nr. 1, so áleggur lógin kommunum nakrar skyldur um, hvat tær skulu og kunnu veita av tænastum. Eftirmetingin skal greiða frá, hvørt lógin virkar eftir ætlan og um kommunurnar halda tær skyldur, sum eru álagdar teimum.

Í løtuni verður síðsta hond løgd á eftirmetingina, sum verður gjørd saman við Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum, Kommunufelagnum og Almannamálaráðnum.

Tá ið landsstýrismaðurin hevur fingið eftirmetingina, fer hann at taka støðu til, um tørvur er á broytingum í lógini.

Tórshavn, 20. november 2021

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
Landsstýrismaður í almannamálum